

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 11 - 2012

# Danski sendiharrin fyri Arktis vitjar Føroyar

Arktiska økið gerst meira og meira áhugavert, nú nýggir møguleikar og avbjóðingar taka seg upp í kjalarvørrinum á veðurlagsbroytingum. Og hetta er ikki minst galdandi fyri Danmark, Grønland og Føroyar. So stóran týdning metir danska stjórnin Arktis fer at fáa í næstu framtíð, at hon herfyri gjørdi av at seta ein sendiharra fyri arktiska økið. Nú landsstýrið í Føroyum eisini er farið at vísa Arktis størri áhuga hevur tað boðið nýggja danska arktiska sendiharranum, Klavs A. Holm til Føroya at tosa um Arktis. Týsdagin skipar Fróðskaparsetur Føroya fyri almennum tiltaki á fabrikkini hjá Østrøm í Havn. Tá fer Klavs Holm at leggja fram høvuðstankarnar í Kongeriget Danmarks Strategi for Arktisk 2011-2020, og Hanna í Horni frá Løgmansskrivstovuni fer at greiða frá um luttøku Føroya í arktiska samstarvinum  Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Jens Christian Svabo Justinussen, adjunktur í samfelagsfrøði á Søgu- og Samfelagsdeildini, Fróðskaparsetur Føroya. Email - jensj@setur.fo stendur á heimasíðuni hjá Setrinum. Í farnu viku varð Arktis eisini á skránni í Tinganesi, tá kendi bretski sendiharrin Alyson J. K. Bailes helt fyrilestur um avbjóðingar og møguleikar hjá smátjóðum í arktiskum høpi. Oljan.fo var við til tiltakið og fer í komandi grein at greiða frá sera áhugaverda fyrilestrinum. Alt hetta skal síggjast í tí høpi, at Føroya landsstýri hevur sett sær sum mál at gera eina ætlan fyri, hvussu Føroyar best gagnnýta fyrimunirnar av broytingunum, sum henda í arktiska økinum, og hvussu vit verja okkum móti árinunum, sum standast av nýggjum farleiðum í økinum. ?Landsstýrið hevur í hesum sambandi sett ein arbeiðsbólk at arbeiða við málinum.